# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 29. juni 2022, kl. 19.00

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hava Ingi Olsen og Pauli T. Petersen, boðað frá, at teimum bórust frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 27. septembur, og játtaði at møta. 2. tiltakslimur Elsi Christiansen fekk fundarboð tann 28. septembur, men fekk ikki møtt.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av tiltakslimunum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 123**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd til umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 153 og matr. nr. 94a
J.nr.: 230022-11-2022

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 16. septembur 2022 umsókn um marknaumskipan millum ogn matr.nr. 153 og matr.nr. 94a.

Tekniska Nevnd mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 123**
Tilmælið varð einmælt samtykt

**Mál 124**
Tilmæli frá Mentanarnevndini um støðumeting av bygningunum - Vestmanna Skúli
J.nr.: 8220002-1-2022

Í samband við at dagføra skúlan - bygningar, setti Vestmanna Bygdarráð 1,5 millión av á fíggjarætlan 2022 til arbeiðið. Fyrsta lið í hesum arbeiði var at samla kanningararbeiðið hjá Fuglark frá 2019 og at fáa gjørt eina støðumeting av bygningunum, fyri at kunna viðgerða spurningin um nýggur skúli skuldi byggjast ella um verandi bygningar kunnu umvælast/útbyggast.

Byggiharraráðgevingarfyritøkan RÁÐ hevur gjørt eina støðumeting av bygningunum.
RÁÐ mælir til at umvæla/útbyggja verandi bygningar.

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. septembur 2022 tilmæli frá RÁÐ.
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum um at umvæla/útbyggja verandi bygningar.

**Viðv. 124**
Tilmælið varð einmælt samtykt

**Mál 125**
Uppskot frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini og tilmæli frá Fíggjarnevndini um umbygging av gamla kirkjugarði
J.nr.: 431002-4-2022

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 24. august 2022 mál um møguliga umbygging av kirkjugarðinum við kirkjuna. Vestmanna Bygdarráð einmælt samtykti at arbeiðast skuldi víðari við uppskotinum hjá EyA arkitektum um at umbyggja kirkjugarðin við kirkjuna.

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 16. august 2022 hvussu farast skal fram. Næsta stig í prosjektinum er at gera forarbeiðið, forkanningar, neyvari skrásetingar, upptekningar og annað sum krevst fyri at fáa eitt grundarlag fyri at kunna seta ávísa upphædd av á fíggjarætlanini fyri 2023, bæði til seinna part av prosjektering, útboð, og byrjan av arbeiðinum á staðnum.

Tilboð frá EyA arkitektum er á kr. 100.000 til forkanningar.

Arbeiðið at gera fleiri hillar til Kirkjugarðin á Knúgvum gjørdist bíligari enn mett til Fíggjarætlan 2022. Trivnaðar- og umhvørvisnevndin mælir tí til at restin av játtanini verður brúkt til at gera forkanningar til umbygging av gamla kirkjugarðinum.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt uppskotið á fundi tann 21. septembur 2022

**Viðv. 125**
Tilmælið varð einmælt samtykt

**Mál 126**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umráðfesting av játtan til Byggibúning
J.nr.: 30102-1-2021

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. septembur 2022 mál um umraðfesting av játtan til Byggibúning.

Fíggjarnevndin mælir til at umraðfesta kr. 250.000 til byggibúning, sum fyribils kann fíggjast av maskinhøllini.

**Viðv. 126**
Tilmælið varð einmælt samtykt

**Mál 127**
Tilmæli frá umsitingini um heimild at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.
J.nr.: 15152-1-2021

Sambært § 44 stk. 2 í kommunustýrislógini (ll. nr. 87 frá 2000 við seinni broytingum) skulu skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. vera undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Mælt verður til at geva Rúnu Ingunardóttir, kommunuskrivara heimild til – saman við Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, ella Sáru Jógvansdóttir, varaborgarstjóra – tá ið hon virkar í borgarsjórans stað – ella um borgarstjórin gerst ógegniður – at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.

**Viðv. 127**
Tilmælið varð einmælt samtykt

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19:30

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen John Zachariassen